Fíggjarmálaráðið

# Mennandi og spennandi starv

## Fíggjarmálaráðið søkir eftir fulltrúa

**Starvið**
Sum fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum kemur tú at arbeiða við sera fjølbroyttum úrvali av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, ið ráðið umsitur. Dømir:

- Tú ráðgevir landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og viðgerð innkomin mál
- Tú fyrireikar uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Tú loysir tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Tú ger analysur, langtíðarætlanir og tryggjar, at hesar verða framdar
- Tú ráðgevir og leiðbeinir aðalráðum og stovnum

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

**Vit bjóða**

- Sjálvstøðugt starv, sum til í stóran mun skapar sjálv/ur
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving
- Eitt starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Flex-tíð

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setunartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Frestin at søkja er ***mánadagin 09. desember 2002 kl. 12.00***. Starvið verður sett skjótast tilber.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 35 20 20.

Fíggjarmálaráðið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya, Hagstovu Føroya og Lønardeildini. Sostatt arbeiða rættiliga nógvir búskapar- og løgfrøðingar undir sama taki í Fíggjarmálaráðnum.

Í Fíggjarmálaráðnum verður m.a. arbeitt við:

- Fíggjarlóg og øðrum játtanarlógum
- Búskaparanalysum og -modellum
- Skatta-, mvg- og tolllógum
- Kapitalmarknaðarviðurskiftum
- Fíggjarútgreiningum av almennari nýtslu

Lýsingin finst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo. Telduposturin er fmr@fmr.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi filial:**

**Skrásetingar-nr.** 3469
**Navn:** Shell U. K. Limited, Faroe Islands Branch (filialur av Shell U. K. Limited).
**Adressa:** Postbox 188, 110 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Filialleiðari**: Hákun Djurhus, Millum Gilja 3, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Filialurin verður teknaður av filialleiðaranum.
**Høvuðsfelagið**:
**Navn:** Shell U. K. Limited
**Adressa:** Shell Centre, London SE 1 7NA, United Kingdom
**Seinasti viðtøkudagur:** 01.06.2000
**Kapitalur:** £ 2.000.000.000
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.

*Skráseting Føroya tann 20. november 2002*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr**. Sp/f 2354,** Sp/f J. K. S. Impex, 767 Hattarvík.
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:** Sámal Jákup Sakarisson, 767 Hattarvík.

*Skráseting Føroya tann 20. november 2002*
*Kristin Balle*

---

# Lesið internet Sosialurin !




i

Sosialurin

## Vøruvognur til sølu



Sera vælhildin Peugot Expert Turbo Diesel. Nýggj píkadekk, summardekk á sportfelgum eru við. Árgang 3/98. Km. 60.000 til sølu.

**Tlf. 217935**

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar

Bilsmiður søkist
Land Rover

Søkt verður eftir bilsmiði til mekaniska verkstað okkara skjótast møguligt

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 310 600

**Bæði til vinnuligt og privat**



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú hevur meira enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum?

Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!




Minst til bilbeltið!

Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.






**Fríggjakvøldið**
*- dyrnar lata upp kl. 22*

***Diskotek***
*við DJ Peter*

*Happy Hour 23-24*
*Ladies Night til kl. 01*

**Leygarkvøldið**
*- dyrnar lata upp kl. 22*

***Diskotek***
*við DJ Kristian*

*Happy Hour 23-24*
*Ladies Night til kl. 01*

BAROK

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 448, Sp/f Verkfrøðingastovan, 100 Tórshavn.
Viðtikið 04.11.2002 at lækka partapeningin við kr. 1.000,00 til kurs 100 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 20. november 2002*
*Kristin Balle*

---

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

## Sjúkrarøktarserfrøðingur til deild M

Á deild M - medisinsk seingjadeild verður søkt eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðingi í barnsburðarfarloyvi frá 01.01.03 til 31.08.03.

Arbeiðstíðin er 0,7 í skiftandi vaktum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Synnøvu Hansen, deildarleiðara telefon 455463 lokal 403/400 ella teldupost kssyn@ahs.fo ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106/107 ella teldupost ksjona@ahs.fo.

**Førleikakrøv:** Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:** Løn og setunartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 9. desember 2002 kl. 12.00.

## Bókhald/Skrivstova

**Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovu okkara á Toftum at byrja skjótast til ber.**

**Uppgávur:**
Arbeiði verður fjølbroytt og kemur at fevna um kundarøkt, bókhald og annað skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar við útbúgving innan handil, bókhald og/ella skrivstovu hava fyrimun. Royndir við teldum, datagrunnum, bókhaldsskipanum og skrivstovuarbeiði geva somuleiðis fyrimun. Álit, nærlagni, góð samstarvsevni og arbeiðsemi verða sett í hásæti.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Kassamiðstøðina og spyrja eftir Kára.

Umsóknir skulu vera Kassamiðstøðini í hendi innan mánaðarskiftið. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Kassamiðstøðin P/F er eitt 7 ára gamalt partafelag, íð veitir tænastur til fiskivinnuna. Vit hava í miðal 7 ársverk umframt undirveitarar. Kassamiðstøðin hevur 5 goymslur kring landið við høvuðsgoymslu og skrivstovu á Toftum. Á skrivstovuni arbeiða vit við Navision Atain bókhald/skrásetingarskipan, HeimaBanka og MS Office skrivstovuskipan.

KASSAMIÐSTØÐIN
FO-650 Toftir
Faroe Islands
Tel. +298 44 99 50
Fax +298 44 99 53

# SERBLAÐ

## FISKIVINNA · ALIVINNA · OLJUVINNA



**4. desember gevur Sosialurin út eitt stórt serblað, har ljóskastarin verður settur á høvuðsvinnur okkara og eina møguliga oljuvinnu**

**Fyritøkur og onnur áhugað, sum ynskja greinar, og/ella lýsing í blaðið, kunnu seta seg í samband við Solby Eliasen á tlf. 228479 ella á teldupost: *solby@sosialurin.fo*, áðrenn fríggjadagin 22. november klokkan 12.00**

Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3466
**Navn:** Sp/f Rit & Ráð Kunningartænasta
**Adressa:** Turiðargøta 8, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 06.11.2002
**Viðtøkudato:** 06.11.2002
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur: :** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Tórfinn Smith, Turiðargøta 8, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Tórfinn Smith, Turiðargøta 8, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift stjórans.
**Grannskoðari: :** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 06.11.2002 - 31.12.2003
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka kunningartænastu, útgávuvirksemi, útleigan og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 20. november 2002*
*Kristin Balle*

---

veitst tú ikki tað?

# JÓLASØLA

**verður leygardagin kl. 10-15 í Verkhúsunum í Saltangará**

**Eisini verður Tombola & kaffisøla**

Verkhúsið
Stíggjur



## Bilur til sølu

Ford Escort Diesel st. árg. 96, koyrt 88.000 km.

Nýsýnaður, í sera góðum standi.

**Tlf. 22 90 44**